## DAGSINS MEINING

# Krepputekin

Sum lýst í Vinnusíðunum mikudagin, so eru lønarútgjaldingarnar innan tað almenna hækkaðar sera nógv seinastu árini.

Blokkstuðulin úr Danmark hvevur gjørt, at vit hava kunnað havt eitt hægri vælferðarstøði og eina størri almenna umsiting, enn føroyska framleiðslan rættvísgerð. Føroyska framleiðslan per høvd er á leið sum Skotland, so Føroyar kundi snilt sæð út sum t.d. Orknoyggjarnar, um samfelagið var øðrvísi innrættað - ikki ein penur tanki.

Nú vil ein ávísur skúli av búskaparfrøðingum fortelja, at grundin til at føroyski almenni sektorurin er so stórur er, at tað er tað, ið verður eftirspurt, og um hesi fólk ikki arbeiddu innan tað almenna, so gjørdu tey okkurt annað - teoretiskt sæð tað næstbesta, sæð frá sjónarhorninum hjá tí einstaka. Eitt er teori, og eitt annað er praksis. Eitt er eitt stórt land, har flestu fólk einki pass hava og ongantíð fara út um landoddarnar, sum t.d. USA, har arbeiðsmegin er at kalla konstant, og eitt eru Føroyar, har øll eru sera mobil, og har ein uppsagdur føroyskur fulltrúi kann spasera beinleiðis inn í eitt starv í Hvidovre Kommunes Social og Sundhedsforvatning. Søguliga síggja vit eisini, at tann búskaparliga tilpassingin, ið hendir í Føroyum, er ikki, at man í einari arbeiðsloysisstøðu fer at uppfinna allar møguligar nýggjar vinnur, men tilpassingin hendir við, at fólkatalið tilpassar seg tann lægra aktivitetin t.v.s. fráflyting.

Nú skal tað almenna so spara hundraðtals milliónir. Hetta er úrslitið av blokkniðurskurðinum, ið hendi í bestu tíðum. Undanfarna samgonga hevði ikki rygg til at spara tær 366 milliónirnar - ein millión um dagin - í rakstrinum, og liggur hendan ótespiliga uppgáva til sitandi samgongu at føra út í verki. Henda sparing kemur at kosta almenn arbeiðspláss, og kemur hetta at merkja handils og tænastuvinnurnar, og fer hetta at geva eitt fíggjarligt bakkast í samfelagnum.

Hvat er so at gera? Sparast má innan tað almenna. Blokkniðurskurðurin hevur gjørt, at vit einki val hava hesum viðvíkjandi. Nú er bara at vóna, at politikarnir hava rygg til at spara í erva og ikki á teimum økjum, ið raka borgaran. Heimahjálpin má til dømis ikki skerjast. Ein raðfesting má gerast yvir, hvørjar tænastur skulu vera almennar. Landsstýrið má hyggja at, hvat er neyðugt, heldur enn hvat er gott at hava. Tann seinni bólkurin má so sparast burtur, uttan at tann fyrsti skal skalast. Tað er harður kostur, men tey gomlu, sjúku og okkara útbúgvingarskipan mugu ikki merkja nakrar sparingar, og so má sparast onkra aðrastaðni.

So er spurningurin, hvat man so ger. Koma nógvar uppsagnir í tí almenna, so flyta fólk av landinum, um man fylgir lættkeyptu teoriunum um at bara man privatiserar og fær fríhandil, so verður alt optimalt. Vit mugu hava eina strategi, ið ikki byggir uppá eina forsimplaða búskaparliga líkavektsteori, har marknaðurin ornar alt, men sum tekur útgangsstøði í, at allir føroyingar skulu hava livilíkindi í Føroyum. Um hetta mál bert kann røkkast við almennari uppíblanding og protektionismu á la íslendsku fiskivinnuna, so mugu vit gera tað.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tingfólk samd við tey samkyndu

**Gerhard Lognberg**
*Løgtingsmaður*



Ja, nógv hevur verið skrivað um ráðstevnuna hjá teimum samkyndu, sum var her á landi. Ikki kann sigast annað, enn at tey samkyndu hava ein stóran skara av skrivandi fólki, sum eru samd við teimum.

Sjálvur var eg ein, sum skrivaði í móti hesi ráðstevnu, og standi eg við hvørt orð.

Sjálvt um Amnesty saman við nógvum øðrum løgdu hart út eftir mær, summi sakliga og onnur ósakliga, tað toli eg væl, tí eg veit, at eg standi á trygg-ari grund. Eg eri sannførdur um, at hetta er synd sum er við til at inntaka okkara land.

Tað sum nú verður dyrgt eftir, er at fáa tað inn í revsilógina »seksuel orientering« v. m.

Um hetta kemur inn í lógina, ja so høvdu hvørki eg ella onnur kunna skriva, tí vit høvdu helst verið rættsforfylgd og enda aftan fyri tremmurnar upp til tvey ára fongsulsrevsing.

Eg ætli mær ikki at góðtaka, at henda lógin kemur nær í námind at løgtinginum, ikki við mær sum samgongulimi.

Tey samkyndu fáa góðan frið í okkara landi. Eingin ger teimum nakað. Men tey krevja ein rætt, sum tey ikki eiga at fáa.

Tað sum tey vilja er, at kirkjur og samkomur verða noydd sambært lóg at víga hesi fólk, mann og mann, kvinnu og kvinnu.

Til endans: Hvar er tá okkara kristna land við okkara vakra krossmerki?

P.S. Ein skrivaði og spurdi við meg, hví eg ikki arbeiddi við øðrum málum t. d. oljuavgjaldinum og øðrum.

Eitt skal eg siga tær og tykkum. Eg skal kempa fyri at fáa tað besta burtur úr, eisini at fáa oljuavgjaldið avtikið, um tað er møguligt.

# Kristin í Føroyum forfylgd

**Frank Jacobsen**

Eftir at hava fylgt við í fjølmiðlunum seinastu tíðina, má eg ásanna, at tey kristnu í Føroyum eru forfylgd.

Tað verður sagt, at tey kristnu fordøma tey, sum hugsa annarleiðis enn tey kristnu. Er tað at hava eina meining fordømandi? Tað er alment kent, at menniskju eru ósamd um ymisk viðurskifti, men mangan mugu tey kristnu hoyra, at tey stýra Føroyum, og at eingin kann hava eina aðra meining, uttan at kenna seg dømdan. Hvør er fordømandi?

Eg vil fegin koma í samband við tey kristnu, sum eru fordømandi og geva teimum eina rættleiðing, tí tað er ikki leiklutur teirra kristnu. Eg havi enn ongan kristnan hoyrt fordøma t.d. tey homoseksuellu, men eg havi hoyrt homoseksuel, sum alment fordøma tey kristnu.

Um ein vil liva sambært Bíbliunnar læru, ella um ein vil liva sambært onkrum øðrum, er ein persónlig avgerð, men tað er eftir øllum at døma vandamikið at hava ta áskoðan, at Bíblian, og harvið kristna trúgvin, er tað besta fyri menniskja.

Herfyri hildu homoseksuel lesandi eina ráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Eg veit ikki hvussu mong tey vóru í tali. Skulu hesi avgera hvat føroyingar skulu trúgva og meina? Skulu hesir persónar avgera hvat Bíblian kallar kærleika? Skulu hesir persónar avgerða hvat í Bíbliuni er gott og rætt og hvat skal koyrast burtur?

Man sannleikin ikki vera tann, at tey, sum siga, at tey kristnu eru dømandi, vera dømd av sínari egnu ringu samvitsku, tí tey vita, at tað, sum tey gera er skeivt?

Gud gav menniskjanum ein frían vilja. Tað er tí avgerðin hjá hvørjum einstøkum, hvussu hann/hon vil liva sítt lív. Gud gav menniskjanum frítt at velja, um tað vildi liva sambært Hansara forskriftum ella ikki. Meirilutin av Føroya fólki ynskir at liva sambært kristnu siðalæruni, og tann rættin eigur hesin meirilutin eins væl og minnilutin av homoseksuellum.

3. Mósebók 18.22 sigur: "Tú mást ikki liggja hjá mannfólki, soleiðis sum ein liggur hjá kvinnu - tað er andstygd!"

Hetta er m.a. tað, sum Bíblian lærir. Um ein, sum hevur upplivað broytingina í lívinum eftir at hava tikið við kristnari trúgv, vil vísa á hesi viðurskifti, er hann/hon so dømandi?

Tey homoseksuellu ynskja møguleikan at kunna ganga saman í skrásett parlag og royna at læra onnur, at kristindómurin byggir á kærleika, og at tað tí ikki kann vera skeivt, og at tað er gott at tvey menniskju finna saman í kærleika. Sambært Bíbliuni - og harvið kristindóminum - er kærleikin meir enn at tveir persónar finna saman.

Jóh. 3.16 lærir okkum at Gud hevði so stóran kærleika til menniskja, at Hann gav son Sín fyri at frelsa. V. 17 lærir at Gud ikki sendi sonin í heimin fyri at døma heimin, men fyri at frelsa heimin. Sambært hesum er kærleiki meir enn góðar kenslur. Tað er vilji. Gud vildi frelsa heimin, og Jesus hekk á krossinum, fyri at geva heiminum frelsuna.

Hesi versini í Bíbliuni eru skúgvað burtur, tí tey hóska ikki inn í heildina hjá teimum homoseksuellu og øðrum við. Tey hava gjørt seg til talsfólk fyri, hvat vit kristnu kunnu trúgva. Tey siga, at vit kristnu eru dømandi. Vit ynskja bert at liva sambært Bíbliunnar læru, og hava loyvt okkum at hava okkara meining um ymisk viðurskifti. Vit kristnu fáa at vita, at vit ikki skulu blanda politikk og religión. Vit kristnu fáa at vita, hvussu vit skulu liva okkara lív, av menniskjum, sum ikki kenna Bíbliuna, av menniskjum, sum hóast tey ikki kenna innihald Bíbliunnar siga, at Bíblian er ómoderna og ikki kann brúkast í dag. Hvør er dømandi?

Tí er niðurstøðan tann, at í dag eru tað tey kristnu í Føroyum, sum verða forfylgd.

Ásannast má, at vit eru komin til tær tíðirnar, sum Paulus skrivar um í 2. Tim. 3.3-4: "Tí tann tíð skal koma, táið tey ikki vilja vita av hini heilnæmu læru, men eftir sínum egnu lystum taka sær lærarar í hópatali, alt eftir sum tað kitlar tey í oyruni; og tey skulu venda oyrunum frá sannleikanum og venda sær til ævintýr."

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.